# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Bygdaráðsfundur 13.05.2013 *kl. 16.00 til kl. 19.30.*</u>**

| | | |
|---|---|---|
| *Fundarstað:* | *Fundarhøli* | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 74/2013 Mentamál</u>**
<u>J.Nr. 2013-0023-0128</u>
**Málslýsing**
Í telduposti 09.04.2013 verður søkt um stuðul til Flight Simulator skeið, sum hevur verið í Løkshøll 15. apríl 2013. Á skeiðnum var fyrstafloks undirvísari úr Vágunum, sum leiddi luttakararnar gjøgnum tað grundleggjandi í BAE flogfarinum.

**Tilmælir**
Á fundi 30.04.2013 mælir Mentanarnevndin frá at veita stuðul til endamálið.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 75/2013 Mentamál</u>**
<u>J.nr. 2013-0023-0127</u>
**Málslýsing**
Í skrivi dagfest 08.04.2013 søkir Føroya civila Hundaførarafelag um stuðul til venjingarútgerð, venjingarøkir, útbúgving av hundavenjarum og kunning til hundaeigarar um hundahald og hundauppaling.

**Tilmælir**
Á fundi 30.04.2013 mælir Mentanarnevndin frá at veita stuðul til endamálið.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.
**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 76/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0023-0129
**Málslýsing**
Í skrivi dagfest 22.04.2013 bjóðar Óli Jacobsen Nes kommunu, at keypa hondskrivaðu bókina hjá Onnu Events fyri kr. 100,- pr. eintak.

Bókin varð skrivað í Danmark í 1925, har hon millum annað greiðir frá lívinum sum próstakona á Nesi.

Hetta er forvitnisligur lesnaður og er ein partur av søguni í Nes kommunu.

**Tilmælir**
Á fundi 30.04.2013 mælir Mentanarnevndin til at keypa 10 stk. bøkur.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 77/2013 Mentamál**
J. nr. 2013-0023-0123
**Málslýsing**
Bygdaráðið hevur staðfest , at tað manglar ein bygdasøga fyri bygdirnar í Nes kommunu og mælir tí til, at bygdaráðið fer at arbeiða fyri, at ein bygdasøga, fyri Nes kommunu, verður skrivað.

Men áðrenn sjálvt arbeiðið, við skrivingini, kann byrja, skal eitt ávíst fyrireikingararbeiði gerast, og í tí sambandinum verður mælt til, at ein arbeiðisbólkur verður settur, sum skal koma við tilmæli við m.a. um:

- hvussu umfatandi bygdasøgan skal verða, nær skal hon byrja søguliga, hvussu lang, osv.
- hvør ella hvørji skulu skriva
- hvussu við fígging
- og tíðarætlan

Arbeiðsbólkurin kundi fingið eina tíðarfreist fyri, nær fyrireikingararbeiðið skal verða liðugt.

**Tilmælir**
Á fundi 30.04.2013 mælir Mentanarnevndin til at seta ein arbeiðsbólk til at gera fyrireikingarararabeiðið og mæla til, at Niklas Foldbo, Tórður Mikkelsen og Elin á Torkilsheyggi manna arbeiðsbólkin.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 78/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0023-0131
**Málslýsing**
Í telduposti 07.05.2013 søkir Beinir Rasmussen um stuðul til útgávu av eini fløgu, sum kemur út í juni mánaða.

Á fløguni eru 10 sangir sum, útgevarin sjálvur hevur skrivað orð og lag til.

**Tilmælir**
Innstillingin frá Mentanarnevndini er, ikki at veita stuðul til endamálið.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 79/2013 Mentamál**
J.nr. 2013-0023-0132
**Málslýsing**
Í telduposti 06.05.2013 spyr Mannbjørn Jacobsen rithøvundur, um Nes kommuna vil keypa 10 bøkur um "Det færøske afængighedsspørgsmál" 159 lesisíður.

**Tilmælir**
Innstillingin frá Mentanarnevndini er, ikki at keypa bøkur.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr 80/2013 Mentamál**
J. nr. 2013-0023-0130
**Málslýsing**
Í telduposti 06.05.2013 verður søkt um stuðul til luttøku á Oyggjaleikunum 2013, sum verða á Bermuda.

Talan er um tveir luttakarar, har annar er úr Nes kommunu og skulu teir luttaka í ítróttargreinini strandaflogbólt ella beach volley. Kosnaðurin fyri hvønn er kr. 8.000.

**Tilmælir**
Innstillingin frá Mentanarnevndini er at játta stuðul til umsøkjararnar uppá kr. 2.000.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og at peningurin verður tikin av konto, Stuðul til mentan, nr. 549000.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 81/2013 Havnamál**
J.nr. 2012-0003-0019
**Málslýsing**
Í telduposti 23.04.2013 søkir havnameistarin, sum er í farloyvi, um at fáa longt sítt farloyvi eitt ár afturat, galdandi frá 01.august 2013.

**Tilmælir**
Á fundi 01.05.2013 mælir Tekniska nevnd til at leingja farloyvið hjá havnameistaranum í eitt ár afturat fram til 1. aug. 2014 og boða honum frá, at farloyvið ikki verður longt eftir 1. aug. 2014.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2013 Byggimál**
J. nr. 2007-0042-0067
**Málslýsing**
Í umsókn dagfest 07.12.2012 søkir Selmar Nielsen, arkitektur um byggiloyvi fyri Petru Rasmussen, Saltnes. Byggiloyvi er til sethús á grundstykki hennara á matr. nr. 67b úti á Nesi, samb. innsendu umsókn og tekningum, sum eru rættaðar 22.04.2013 í samb. við frástøðu millum veg og bilhús.

Húsini eru í einari hædd, harafturat eitt bilhús, sum er í tveimum hæddum, har undirhæddin í stóran mun er undir jørð. Tekjan bindur hús og bilhús saman.

Samlaða gólvvíddin á húsinum, íroknað yvirhædd á bilhúsinum, er 121m². Harafturat er hemsur á 35m². Undirhæddin á bilhúsið er 27m².

**Tilmæli**
Á fundi 01.05.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta Petru Rasmussen byggiloyvi til sethús á matr. nr. 67b samsvarandi innsendu tekning.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2013 Jarðarmál**
J.nr. 2013-0042-0313
**Málslýsing**
Í telduposti 11. apríl 2013 søkir Rúni Hansen um loyvi til, at fáa bora eitt hol til jarðhita til sethús síni á matr. nr. 404b.

Borað verður eitt hol samb. umsókn, plantekning og viðmæli frá Jarðfeingi.

**Tilmæli**
Á fundi 01.05.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjaranum at bora fyri jarðhita samsvarandi innsendu tekning.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 85/2013 Byggimál**
J. nr. 2013-0042-0315
**Málslýsing**
Í skrivi dagfest 09.04.2013 søkir Petur Hans Hansen um loyvi til at seta eini lítil hús á trøðna í Fossdali. Húsini eru frá Tekniska skúla í Havn og eru uml. 14m² til støddar við lágari reising. Stysti avstandur frá miðju á landsvegnum verður uml. 27m

Húsini skulu brúkast til fóður goymslu og til goymslu av amboðum.

**Tilmælir**
Á fundi 01.05.2013 mælir Tekniska nevnd til at játta Petur Hans Hansen byggiloyvi til hús á trøðni í Fossdali.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 86/2013 Trivnaðarmál**

J.nr. 2009-0031-0055

**Málslýsing**

Arbeitt hevur verið við at fáa til vega rehabiliterings/venjingartól til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim. Økisterapeutarnir hava, saman við terapeutunum á ERE, gjørt eina tørvsmeting og fyri at nøkta tørvin má keypast útgerð og er kostnaðurin av hesi útgerð kr. 400.000,- v/mvg og flutningi.

Lions Club Eysturoy hevur avgjørt at gjalda 1/3, søkt verður privatar stuðlar um 1/3 og at kommunurnar gjalda 1/3 av hesi upphædd. Parturin hjá Nes kommuna kann koma at verða uml. kr. 16.000 at gjalda yvir 2 ár.

Tey eru byrjað so smátt at venja og samb. økisleiðaranum og fysioterapeutunum eru tey, sum gera brúk av tilboðnum, sera væl nøgd.

**Tilmælir**

Á fundi 01.05.2013 mælir Trivnaðarnevndin til, at Nes kommuna er við í fíggingini av rehabiliteringini/venjingartólum til ERE samb. ætlan.

Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini og at peningurin verður tikin av konto, Stuðul til endamál innan Almanna- og Heilsuverki, nr. 549000.

**Avgerð**

Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2013 Vinnumál**

J.nr. 2013-0052-0002

**Málslýsing**

Í telduposti 07.04.2013 er uppskot komið frá borgara um ókeypis busskoyring fyri borgarar í Nes kommunu.

Kostnaðurin fyri uppskotið er leystliga mettur at verða uml. 1 – 1,2 mió kr. Ein slík tænasta er kostnaðarmikil, men vil vera øllum borgarum at gagni. Bussarnir, ið hugsað verður um at brúka, eru tveir ymiskir, ein við rampu fyri rullustólar og ein vanligur bussur.

**Tilmælir**

Á fundi 02.05.2013 mælir Vinnunevndin til at boða borgaranum frá, at Nes kommuna, í løtuni, ikki hevur fíggjarliga orku til ætlanina.
Á fundi 08.05 2013 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá

Vinnunevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Vinnudnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 88/2013 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0011-0029
**Málslýsing**
Viðgerð og góðkenning av grannskoðaða roknskapinum fyri 2012 hjá Nes kommunu, soleiðis sum hann er uppsettur av SPEKT.

Roknskaparleiðarin hjá Nes kommunu, framlegði roknskapin fyri bygdaráðnum.

**Avgerð**
Bygdaráðið viðgjørdi roknskapin, og hevði ikki ítøkuligar viðmerkingar. Bygdaráðið samtykti at góðkena roknskaðin fyri 2012.

**Mál nr. 89/2013 Fíggjarmál**
J.nr. 2012-0011-0033
**Málslýsing**
Fyrsta viðgerð av eykajáttan til fíggjarætlanina fyri 2013

| | |
|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting í alt (meirjáttan) | 66.000 |
| §2 Almanna- og heilsumál í alt (meirjáttan) | 15.000 |
| §3 Børn og ung í alt (meirjáttan) | 20.000 |
| §5 Mentan rakstur í alt (minnijáttan) | -291.400 |
| §5 Mentan íløgur í alt (meirjáttan) | 2.550.000 |
| §6 Teknisk mál í alt (meirjáttan) | 200.000 |
| §7 rakstur í alt (minnijáttan) | -95.000 |
| §7 íløga í alt (meirjáttan) | 2.000.000 |
| **í alt rakstur** (minnijáttan) | **-85.400** |
| **Í alt íløgur** (meirjáttan) | **4.550.000** |
| §20 í alt (meirjáttan) | 85.000 |
| **Endaligar reguleringar** | **4.549.600** |

**Sum verður fíggja soleiðis:**

| | |
|---|---|
| Lántøka | 2.540.000 |
| yvirføra lán frá 2011 | 2.000.000 |
| **lántøka í alt** | **4.540.000** |
| | |
| **Tikið av tøkum peningi** | **9.600** |
| | |
| **Í alt** | **4.549.000** |

**Tilmæli:**
Á fundi 08.05. 2013 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við eykajáttanini til fíggjarætlanina 2013, sum viðførir eina meirútreiðslu á kr. 4.549.000.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.